UTTAN ÚR HEIMI

## Seks spurningar til bin Laden

**Sjónvarpsstøðini CNN stendur í boði at seta Osama bin Laden seks spurningar. Hetta skal gerast um støðina al Jazeera, ið hevur umboð í al Qaeda, sum USA skuldsetur fyri at standa aftanfyri atsóknirnar tann 11. sept.**



Mynd: Reuter

*Dagfinn Olsen*

Í gjøgnum al Jazzera og al Qaeda stendur CNN í boði at seta Osama bin Laden seks spurningar. Eitt sjónband við svarunum hjá bin Laden verður sent aftur til al Jazzera, sum síðani kann senda hetta til CNN.

CNN sigur seg einki vita um, hvussu al Qaeda samskiftir við bin Laden ella hvussu arabiska sjónvarpsstøðin hevur hugsað sær at givið bin Laden spurningarnar.

CNN ger greitt, at har góðtaka tey ikki nøkur krøv frá bin Laden og tey tryggja sær eisini, at tey ikki eru noydd at senda sjónbandið frá honum. Eisini sigur CNN, at aðrir fjølmiðlar sleppa at nýta sjónbandið, um teir ynskja tað.

CNN hevur hesar spurningar til bin Laden:

**1.** Talsmaður tín hevur hálovað álopunum 11. september, har fleiri túsund ósek mistu lív, og hevur hótt við fleiri álopum sum umfata flogfør og bygningar. Hvussu kunnu tú og viðhaldsfólk tíni verja dráp á ósek?

**2.** Hvønn leiklut hava tú og al Qaeda í álopunum 11. september?

**3.** Hvønn leiklut hava tú og tín felagsskapur í miltálopunum?

**4.** Fingi nakrir av flogrænarunum tann 11. sept., ella hjálparum teirra, fíggjarligan stuðul frá el Qaeda, hava teir fingið venjing í legum hjá el Qaeda í Afghanistan og var nøkur stjórn ella felagsskapur við í hesum?

**5.** Hevur tú áður eggjað viðhaldsfólki til at ogna sær hópoyðingarvápn, kjarnorku ella kemisk vápn. Hava tit hesi vápn og verða tey nýtt, um so er?

**6.** Flestu muslimar og arabiskir leiðarar og muslimskir prestar siga, at islam ikki rættvísger slíkar atsóknir, sum tú verjir. Teir fordøma teg og viðhaldsfólk, og sjálvútrópta heilaga kríggið. Hvat er títt svar upp á hesar atfinningar?

# Kofi Annan – tann gløggi ghanesin

**Tað var als ikki óvæntað, tá norska Nobel-nevndin boðaði frá, at hon hevði valt at lata ST-aðalskrivaranum Kofi Annan ársins friðarheiðursløn. Tí Annan er heiðurslønina verdur**



Mynd: Reuter

Tann 63 ára gamli ghanesin hevur eina medferð og eitt sinnalag, sum ger, at fólk fáa álit á honum. Hann loypur ongantíð framav, og tað sigst, at sjálvt ikki tann harðasti orðadrátturin kann gera hann harðmæltan. Hann er altíð kurteisligur og hevur altíð virðing fyri tí, sum hann tosar við, sama hvussu langt er ímillum sjónarmiðini. Hann var tann sami, tá hann tosaði við fremsta amerikanska ST-mótstøðumannin, senatorin Jesse Helms, og tá hann hitti Saddam Hussein í Bagdad.

Júst hetta er hansara arbeiðsháttur. At tosa beinleiðis andlit til andlits við hin partin, tí hansara áskoðan er, at tílíkar samráðingar ella tílíkir fundir kunnu loysa nógv trætumál og mýkja fíggindar. Við sínum frálíkum eginleikum at tosa við fólk heldur hann seg til tann siðiliga atburðin, men at halda fast um síni sjónarmið.

Hesir eginleikar hansara eru ikki komnir í sambandi við starvið sum ST-aðalskrivari. Kofi Annan er ein av teimum afrikanarunum, sum við hollari útbúgving hevur nomið sær viðurkenning.

Hann vaks upp sum sonur ein av ættarhøvdingunum í heimlandinum Ghana. Seinni fór hann at lesa búskaparfrøði og tøknifrøði á lærdum háskúlum í Afrika, Genéve og í St. Paul í USA. Sítt embætisprógv fekk hann á Massachusetts Institute of Technology í USA.

### Sín egni harri

Maðurin, sum nú hevur fingið Nobel-friðarheiðurslønina, kennir ST-skipanina sum sínar egnu brøkur, tí har hevur hann arbeitt tað mesta av sínum vaksnamannalívi. Hann hevur verið á vegamótum, har hann hevur verið noyddur at taka tung tøk við amerikansku leiðsluna, bæði tá talan hevur verið um pening og altjóða sáttmálar - øki, har USA ferð eftir ferð hevur verið eitt haft um beinini á ST og aðalskrivaranum sjálvum.

Løgið at hugsa sær, tí tað var júst USA, sum gjørdi, at Kofi Annan bleiv ST-aðalskrivari. Í 1996 nýtti amerikanska stjórnin sýtingarrættin ímóti undanmanninum Boutros Boutros-Ghali, sum annars hevði verið einmælt afturvaldur. USA tók síðani undir við Kofi Annan, sum frammanundan hevði víst sera góð evni, tá hann hevði umskipað friðarvarðveitandi arbeiðið hjá heimsfelagsskapinum.

Tað er kortini eingin, sum kann siga, at Annan hevur verið ørindadrongur hjá USA. Hann er sín egni harri í bardaganum fyri ST og tí fátæka partinum av heiminum, haðani hann sjálvur er ættaður. Hann megnaði at gjøgnumføra eina sera umfatandi verkætlan, hvørs endamál var at gera ST-skipanina virknari. Hetta hevur m. a. havt við sær, at nógv starvsfólk hjá heimsfelagsskapinum hava mist arbeiði, men ongantíð hoyrdist nakar finnast at avgerðum hansara.

Tað einasta, sum hann kann lastast fyri, er, at hann var í so seinur at leggja upp í fólkamorðið í Rwanda. Men hann var maður fyri at viðurkenna mistakið og hevur seinni roynt at bøta um tað.

### Svenska konu

Kofi Annan hevur eitt serligt tilknýti til Norðurlond. Hetta kemst fyrst og fremst av, at hann hevur svenska konu. Nana Annan, fødd Lagergren, er skyldkona kenda svenska diplomarin Raoul Wallenberg, sum hvarv undir seinna heimsbardaga.

Svenska sambandið merkir tó ikki, at hann bara ferðast í Svøríki, tá hann kemur hendanvegin. Honum dámar sera væl ta norsku náttúruna, og Kofi Annan er eisini millum heiðurslimirnar í Norska Ferðamannafelagnum.

# Trupult at fáa »Kursk« í dokkina

**Gronin á kavbátinum verður ikki tikin upp fyrr enn næsta ár**



Mynd: Reuter

Ætlanin var, at "Kursk" skuldi setast í turrdokkina á flotastøðini nærhendis Murmansk í gjár, men arbeiðið er nú útsett til um vikuskiftið. Tað vísti seg, at tann stóri prámurin, sum heldur kavbátinum uppi, megnaði ikki at lyfta bátin nóg langt upp, til at hann kundi koma inn í dokkina. Tí er avgjørt at gera tvey festi á kavbátin afturat.

Bjargingarprámurin "Giant-4" skal so seta kavbátin í turrdokkina. Tað var "Giang-4", sum tók tann 18.000 tons tunga kavbátin upp av botninum í Barentshavinum, har hann hevði ligið á 60 favna dýpi síðani tann 12. august í fjør.

Tá kavbáturin er komin í turrdokkina, fara russiskir serfrøðingar at kanna hann og at taka tær 22 Granit-rakettirnar út. Tey líkini, sum framvegis eru umborð, skulu eisini takast í land.

»Kursk« sakk eftir tvær spreingingar, men eingin veit enn við vissu, hvat hetta vóru fyri spreingingar. Nú vónar russiski herflotin, at kanningar av kavbátinum kunnu avdúka, hví hann fór til botns.

Samstundis hava russar gjørt av at bíða við at taka gronina á kavbátinum upp. Hon bleiv sagað av, men russiski herflotin heldur tað ikki vera ráðiligt at taka hana upp nú og hevur tí valt at útseta hetta arbeiðið til næsta ár.



# Hevur ongan skund



*Tað er góð tíð at finna út av, hvat økið í Hoydølum skal brúkast til, heldur Óli Holm, landstýrismaður*

Mynd: Edvard Joensen

**Heðin Mortensen, tingmaður, hevur spurt Óla Holm, landstýrismann, um ítróttarháskula í Hoydølum. Landstýrismaðurin svarar aftur, at hann hevur góða tíð**

FYRISPURNINGUR

*Edvard Joensen*

Óli Holm, landstýrismaður við mentamálum, hevur svarað fyrispurningi frá tingmanninum Heðini Mortensen um ítróttarháskúla í Hoydølum. Landsstýrismaðurin heldur, seg hava góða tíð at viðgera málið.

Spurningurin frá Heðini Mortensen var soljóðandi: *» Tekur landsstýrismaðurin undir við í framtíðini at skipa økið við studentaskúlan í Hoydølum sum ítróttarumsiting, ítróttarháskúla og breytir til frælsan ítrótt?«*

Hann vísir í viðmerkingunum á, at nú talan er um at flyta studentaskúlan úr Hoydølum út á Marknagilsvegin, verður økið í Hoydølum tøkt til annað endamál. Og her metir hann, at frálíkt pláss er at leggja ein ítróttarháskúla við teimum møguleikum, ein slíkur eigur at hava.

Heðin Mortensen metir tað neyðugt fyri okkara luttøku í altjóða ítrótti í framtíðini, at vit hava ein skúla, har vit kunnu útbúgva bæði aktiv ítróttarfólk eins og venjarar og leiðarar annars.

Hann vísir eisini á, at tað eru partar av ítróttinum, sum hava í so vánaligar umstøður í dag. Serliga er tað frælsi ítrótturin, sum aftur verður tikin fram.

Í svari sínum til Heðin Mortensen, løgtingsmann, sigur Óli Holm, landstýrismaður við undirvísingarog mentamálum, at spurningurin hevur verið viðgjørdur í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, men at eingin endalig avgerð er tikin um, hvat økið í Hoydølum skal brúkast til.

Hann er samdur við Heðini Mortensen í, at skilagott hevði verið at fingið hendan spurningin avkláraðan í góðari tíð, sigur hann, men heldur hinvegin, at tað er eins skilagott at viðgera spurningin sera gjølla og finna út av, hvat økið annars kann brúkast til.

Landstýrismaðurin sigur, at tað ivaleyst eisini eru onnur áhugamál, sum økið og bygningarnir kunnu brúkast til.

Landstýrismaðurin vísir á, at bygningarnir eru í ringum standi og skulu hava stórar ábøtur, áðrenn teir kunnu brúkast aftur. Tí metir hann tað skilagot at gera endaliga av, hvat teir skulu brúkast til og so seta teir í stand eftir tí.

Alt í alt metir Óli Holm, landstýrismaður, at hann hevur góða tíð at viðgera málið, og tað fara tey so nú at gera í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, sigur hann í svarinum til Heðin Mortensen.

# Tombola og grønir dagar í SMS

**At H71 skipar fyri tiltøkum á torginum í SMS er vorðið afturvendandi tiltak og nú er aftur eitt tiltak. Umframt tombola, er eisini grøn vika á skránni**

GRØN VIKA

*Dagfinn Olsen*

Stuðlafelagið hjá H71 skipar aftur í ár fyri tiltaki á torginum í SMS. Talan er um tombola við góðum vinningum.

Umframt verður eisini skipað fyri grønari viku í samband við tombolaspælið. Finnbogi Joensen fer at siga frá um umhvørvisspurningar og hvussu grønur skúli er settur á stovn í Vestmanna. Sagt verður frá, hvussu vit kunnu gagnnýta burturkast og kompostkassar verða sýndir fram.

Hjúnini Bláhamar fara eisini at sýna Enjo reingerðingaramboð, ið gera reint uttan nýtslu av sápu.

# Eingin hjálp longur til stamarar

**Stamarar hava í áravís leitað sær hjálp á Sernámsdeplinum, men nú er undirvísingin niðurløgd. Stamarar finna saman í Høgættarfelagnum og har fara tey at taka henda spurning upp á almennum fundi altjóða stamidagin**

STAMING

*Dagfinn Olsen*

Í mong ár hava fólk við stamitrupulleikum leitað sær serkøna hjálp á Sernámsdeplinum. Men hetta ber ikki til longur. Eingin hjálp er at heinta longur. Orsøkin er einføld. Stamiundirvísingin á Sernámsdeplinum er nevniliga niðurløgd.

Hetta metir Høgættarfelagið vera eina sera óhepna støðu hjá stamarum at koma í. Fleiri foreldur at stamarum er ørkymlað og hava vent sær til felagið.

### Altjóða stamidagur

Felagið ætlar at umrøða spurningin. Tann 22. oktober er altjóða stamidagur. Tiltøk verða sett í verk í øðrum londum og eisini felagið hjá stamarum í Føroyum, Høgættarfelagið, ætlar at seta dám á dagin.

Limir, og onnur áhugað, eru vælkomin til hugnakvøld í MBF húsinum mánakvøldið 22. oktober klokkan 19:30. Har ætlar Høgættarfelagið millum annað, at málið um niðurløgdu undirvísingina skal koma til umrøðu.

# Bót fyri vánaligan laks



**Í Noreg hevur ein laksaútflytari fingið stóra bót fyri at hava selt ov vánaligan laks**

BÓT

*Dagfinn Olsen*

Laksaútflytari í Hordalandi í Noreg hevur fingið 750.000 krónur í bót, fyri at hava selt ov vánaligan laks.

Orsøkin er, at ikki er loyvt at selja so vánaligan laks sum mannaføði, sigur løgreglan við NRK.

Upprunaliga varð laksurin pakkaður sum ídnaðarfiskur, men fiskaútflytarin fekk statstrygd fyri, at fiskurin var nóg góður.

Í Estlandi kom veruliga góðskan tó fram í ljósið. Bótin uppá 750.000 krónur svarar til virðið á laksinum. NRK sigur, at hetta er fyrstu ferð, at fiskaútflytari fær bót fyri sølu av ov vánaligum fiski.